VEKS

# Ergoterapeutur og Fysioterapeutur (farloyvisstarv)

Vit sóknast eftir ágrýtnum, jaligum og hugskotsríkum starvsfólkum til Heimatænastuna í VEKS.

Størvini eru

- **Farloyvisstarv sum Fysioterapeutur, starvsbrøk 0,8 í tíðarskeiðnum 1. mars 2018 til 28. februar 2019.**
- **Ergoterapeutur, starvsbrøk 0,8, arbeiðsstaður út frá Mørkini í Streymnesi. Byrjunardagur eftir nærri avtalu.**

Tú verður partur av einum terapeutiskum starvstoymi við 4 starvsfólkum - 2 fysioterapeutar og 2 ergoterapeutar.

**Tilvísing**

Størvini hava tilvísing til avvarandi leiðara.

**Førleikakrøv**

- Útbúgving og góðkenning sum ávikavist fysioterapeutur og ergoterapeutur
- Áhuga fyri at dagføra fakliga førleikan innan terapeutiska øki.
- Góð samstarvs- og samskiftisevni.
- Vilja og evni at virka í einum tvørfakligum toymi.
- Evnir at arbeiða sjálvstøðugt.
- Hava lætt við at samskifta, bæði í bólki og við hvønn einstakan.
- Virkisfýsni og áhuga í at menna terapeutiska virksemið og sosiala umhvørvið í síni heild, í tøttum og uppbyggjandi samstarvi við leiðslu, starvsfólkahóp og einstaka borgaran.
- Tola broytingar í arbeiðsuppgávum
- Telduførleika á brúkarastøði.
- Koyrikort til persónbil

**Arbeiðsuppgávur**

- Skipa og útinna fyribyrgjandi venjingar, endurvenjingar v.m. bæði í bólkum og hjá tí einstaka borgaranum.
- Vera við til at menna strategisk, faklig og praktisk viðurskiftir innan tað terapeutiska økið.
- Samstarva við m.a. visitator innan terapeutiska partin í samband við visitering, heimavitjanir v.m.
- At stuðla undir, at eldri borgarar varðveita, menna ella endurvinna sínar virkisførleikar.
- Heilsufremjandi og sjúkufyribyrgjandi venjingar og onnur átøk fyri eldri borgarar.
- Undirvísa og ráðgeva starvsfólkum, borgarum og avvarðandi.
- At kanna, greina og meta um virkisførleikar, og í mun til hetta, at seta neyðug átøk í verk.
- Innan terapeutiska øki vegleiða og undirvísa starvsfólkahópi og einstaka brúkaranum.
- Tryggja og menna gott samskifti og høgt kunningarstøðið, bæði til borgarar, starvsfólk og aðrar samstarvspartar.
- Stuðla starvsfólkahópinum í sínum dagliga arbeiði.

**Vit kunnu bjóða**

- Góðar umstøður og fjølbroyttar avbjóðingar, har tú fært møguleika at seta tín dám á, og verða partur av framhaldandi menning av tilboðum og tænastum.
- Dugnaligar starvsfelagar
- Jaligt og vinarligt arbeiðsumhvørvi

**Setanarstað og lønarviðurskifti**

Setanarstaðið er Heimatænastan í VEKS

Størvini verða sett sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið/ Kommunala Arbeiðsgevarefelagið og Fysioterapeutfelagið og Ergoterapeutfelagið.

**Umsókn**

Skrivlig umsókn við avritum av prógvum, lívsrensli (cv), viðmælum v.m. skal sendast til

**veks@veks.fo**

ella

**Heimatænastan í VEKS**
**Bakkavegur 59**
**350 Vestmanna**

**Freist**
Umsóknir skulu vera okkum í hendi í seinasta lagi **mikudagin 28. februar 2018 kl. 12:00.**

Nærri upplýsingar um størvini fáast við at venda sær til

Niels A. Joensen, tlf. 260552 ella teldupost nielsj@veks.fo

_ _ _ _ _

Heimatænastan í VEKS er eitt kommunalt samstarv ímillum Vestmanna- Eiðis-,
Kvívíkar- og Sunda Kommunu. Nærri lýsing av virkseminum sæst á heimasíðu okkara veks.fo